


# Nógvir møguleikar í fótbólti

- Hann dugir so ótrúliga væl at spæla fótbólt.
- Hvat skal hann so gera, tá hann blívur gamal og nærsýntur
- So kann hann verða dómari



# Kekkur á 1700 milliardir

Ein ungur maður helt, at hann skuldi snýta seg til pengar, og hann gjørdi eina heilhjartaða roynd í Chase Bank í Fort Worth í Texas. 21 ára gamli Charles Ray Fuller møtti í bankanum við einum kekki, sum hann skuldi innloysa. Kekkurin var á 180 milliardir pund – svarandi til góðar 1700 milliardir krónur. Kekkurin skuldi verða frá hansara vermóðir, og sambært unga manninum, hevði kvinnan givið honum kekkin, so hann kundi byggja sítt dreymastudio. Fuller var meldaður til løgregluna, og nú skal hann inn at sita – ikki í einum studio, men í einum fongsli.

## Leyst og fast um stórt og smátt

Nú skulu politikkarnir geva makan upp. Vit onnur hava langt síðani uppgivið politikkarnar! MAKAN til frekleika hava landsstýrisfólkini ikki hoyrt um áður!

Fyrr var tað meira óMAKAleyst at gerast landsstýrisfólk!

Ómaksgjald ella MAKAgjald?

Nú brýtur í bæði borð hjá sjómonnum, bæði bylgjur og HórALDUR?

Sjómenn fara í land vegna (Hór)aldur!

Tað nyttar einki at práta við HB-arar í hesum døgum, teir eru púra MÁL-leysir

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Roykja uttan royk**
»...roykávaringin fer í gongd, tá fólk standa og roykja tætt við sjálvtøkuna - eisini, um eingin roykur er.«
Dimma.fo

**Stakkals sandoyingar**
Annar av brasiliumonnunum, Rodrigo, hevur klárað seg væl á liðnum higartil, og sunnudagin skeyt hann útjavnandi málið fyri KÍ til 1-1 ímóti sandoyingum. Men hjá hinum sandoyinginum hevur gingið knapt so væl. Hann hevur havt eitt sindur ilt við at bitið seg fastan á besta liðið, og nú skilst á brøgdum, at hann helst er á veg heimaftur til Brasilia.
Norðlýsið

**Arbeiðir hann á Strandferðsluni?**
Bryan Adams broytir ferðaætlanina
Olivant

**Hvussu skjótt fiska teir?**
Søkt verður eftir Elektrikara til danskan rækjutrolara, sum fiskar í Grønland sum skjótast.
ÚF

**Vorðið sum neyt**
Neyt í Toftabø, Vestmanna til sølu. Um hóskandi boð fæst. Vídd 41 fermetrar, í tveimum hæddum. Matr. nr. 201.
Lýsingartorgið



# Nú má vera nóg mikið

Genislav Naidenov úr Bulgaria hevur gjørt nógv burtur úr at pynta andlitið hjá sær, og han hevur so nógvar piercingar og tatoveringar, at hann var við í einari altjóða kapping í Sofia um vikuskiftið. Tað kann væl verða, at hann liggur væl fyri í teirri kappingini, men nú kann ikki verða nógv eftir at pireca...